# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein stríðsmaður

Tað mundi koma mongum dátt við, at Óli Jacobsen ikki varð afturvaldur til formann í Føroya Fiskimannafelag. Óli hevur sum kunnugt staðið á odda fyri hesum gamla felag í trýatiseks ár. Uttan at taka munnin ov fullan kunnu vit staðfesta, at Óli hevur verið ein framúr góður formaður og felagi og fiskimonnum ein hugdjarvur og sterkur talsmaður. Tá Óli tók við var felagið komið í ein aldudal. Við ótrúligum seiggi og treiskni hevur hann stútt og støðugt ment felagið til ein veruligan maktfaktor í landinum. Hann hevur í triðingsøld verið hin heitasti talsmaður fiskimanna og hevur meira enn nakar annar gjørt sítt til, at Fiskimannafelagið er háttmett og sera máttmikið í politisku skipanini.

Umframt at vera fiskimonnum ein góður formaður er Óli kendur um alt landið sum ein demorkatiskur stríðsmaður, ein samfelagsdebattørur av teimum heilt stóru. Her eru ikki so nógv, sum tora at stíga fram og siga sína meining. Óli er ein teirra, sum torir. Hann talar Roma beint ímót, og sigur sína meining uttan mun til, hvør er fyri, høgur ella lágur. Hann er ein engasjeraður persónur, sum er heilur, har hann er tað veri seg í fakfelagslívi, Amnesty ella hann leggur sína orku í altjóða verkamanna samstarv. Hervið er eisini sagt, at Ólí er høgt mettur eisini uttan fyri landoddarnar, og sæst hetta av, at hann í mong ár hevur verið formaður í fiskimannaddeild altjóða flutningsarbeiðarafelags. Hann hevur í viðmerking sagt, at hann leggur frá sær við góðari samvitsku. Hesi eru orð av sonnum søgd. Nú Óli ikki var afturvaldur verður meira tíð til pivatlív og til luttøku í almenna orðaskiftinum. Vit kunnu ikki vera rødd hansara fyri uttan, og vit vóna tí, at Óli nú av álvara fer at kasta seg út í samfelagsorðaskiftið. Tað kann bert hækka støðið og fáur dugir sum Óli at varpa ljós á demokratiskar og humaniterar spurningar.

Óli varð feldur á demokratiskum vali. Soleiðis eru nú einaferð spælireglurnar, og tær eiga øll at virða. Maður kemur í mans stað, og bert tíðin vil vísa, um nýggi maðurin megnar at lyfta arvin eftir Óla. Jan Højgaard kemur til eitt sera vælvirkandi, vælskipað og fíggjarliga sterkt felag. Hann hevur lovað fiskimonnum betri pensión, atgongd til ALS og annað meira. Tað verður áhugavert at síggja, hvussu leikur fer. Øll unna fiskimonnum tað besta, og vit fara sjálvsagt her at ynskja nýggja formanninum tilukku og ynskja somuleiðis at virksemi hansara verður fiskimonnum og samfelagnum øllum til gangs.

**Sosialurin**

Aftan á formansvalið í FF:

## Takki fyri meg!

ÓLI JACOBSEN



**Mínar viðmerkingar til formansvalið í Føroya Fiskimannafelag eru hesar:**

Aftaná 36 ár sum valdur formaður í FF hevði eg ikki ætlað at koma í ta støðu at verða stemmaður út.

Men umstøðurnar gjørdu, at eg hesa ferð kortini gjørdi av, at fiskimenn skuldu møguleikan fyri at fáa eitt reelt val. Eg havi eisini skrivliga lýst tann politikk, sum eg havi staðið fyri væl og virðiliga, so fiskimenn vita, hvat teir hava havt at taka støðu til.

Hetta er endað við, at eg gjørdist aftastur í røðini av teimum uppstillaðu, og tískil er mín leiklutur at virka fyri fiskimonnum lokin.

Eg leggi frá mær við góðari samvitsku. Eg havi saman við felagsstjórn og fiskimonnum verið við til at menna FF til tað, tað er í dag. Hetta er prógvað í teimum 36 ársfrágreiðingunum, sum eg havi lagt fram, har tað eru hend mong framstig fyri fiskimenn bæði so og so. Ein av stórsigrunum hesa tíðina var skattaskipanin hjá sjómonnum, sum hevur givið meira enn eina hálva milliard krónur seinastu 9 árini, og sum framvegis gevur siglandi fólkinum 50-60 mill kr. árliga, hóast stóra mótstøðu frá almennu Føroyum.

Fyrsta ítøkiliga broytingin við formansskiftinum verður, at komandi FF-blað verður í hvussu er tað seinasta frá míni hond. Vónandi koma aðrir fjølmiðlar at hava áhuga fyri tí tilfari, sum hevur verið í FF-blaðnum, og sum hevur verið høgt mett av teimum flestu, men sum eisini hevur verið illa lýtt av pørtum av "almennu Føroyum".

Ynskt verður nýggja formanninum eydnu at føra felagið víðari, og samstundis vil eg takka øllum teimum, sum eg havi havt gott samstarv við øll hesi árini. Her er serstakliga talan um álitismenn og starvsfólk hjá felagnum og teir nógvu fiskimenninar, eg havi havt samband við. Nógvir av hesum eru framvegis mínir vinir, og teir koma at standa eftir. Eisini takki eg teimum, sum hava stuðlað mær til hetta val.

Tískil takki eg fyri meg.

## Um tey 7000 flýggjandi donsku postboðini o.a.

HERI SIMONSEN



Í farnu viku stóð at lesa í einum tíðindastubba í Sosialinum: "*Tað er eftir øllum at døma ikki serliga hugaligt at vera postboð í Danmark. Í hvussu er søgdu næstan 7.000 postboð upp í fjør (2006)*". Og her kann ein skunda sær at leggja aftrat, at støðan var enn verri í 2005. Tá søgdu næstan 10.000(!!) postboð upp í Danmark.

**Veðurlagið hjálpir ikki**
Danmark hevur eitt væl betri veðurlag enn Føroyar. Hagfrøðiliga hava teir 190 dagar við ælingi/regni meðan Føroyar hava 280 dagar við ælingi/regni. Danmark hevur hagfrøðiliga 1.700 sóltímar um árið. Føroyar hava 800 sóltímar árliga. Miðalhitin í Danmark er hagfrøðiliga 5-6 hitastig heitari enn í Føroyum. Í juli/august hava teir 16-17 hitastig, meðan vit liggja um tey 11 hitastigini. Haraftrat liggur Danmark væl sunnari enn Føroyar, og tískil hava teir 2-3 tímar meir dagsljós á hávetri, enn vit hava í Føroyum. Hóast postboðini í Danmark hava allar hesar veðurligu og praktisku fyrimunirnar fram um føroysku starvsfelagarnar so trívast teir kortini ikki í Post Danmark. Hví?

**Eingin trivnaður!**
Fram til endan av 1970-árunum var tað gott at starvast hjá gamla Post og Telegrafvæsenet. Men so bleiv lønin nógv niðurskorin, eykagjøld fyri eyka byrðar so sum lýsingarbløð blivu avtikin. Upp aftur seinni reyk tann síðsta gularótin: akkordin. Tosaði við ein føroying, sum starvaðist ¾ ár hjá Post Danmark. Hann segði, at enntá við nakað av yvirtíð kláraði hann ongantíð at klóra seg upp um eina mánaðarløn uppá 20.000. Hann bleiv so ikki verðandi har. Og tað er væl skiljandi! Leggur ein hasar negativu faktorar saman er lætt at skilja hví eingin trívist í hesum starvsbólkinum. Aðalstjórin í Post Danmark, Helge Israelsen umber seg bara við at: *"Jamen der er så mange andre virksomheder, som har en stor udskiftning i personalet"!* Her skal leggjast aftrat, at trivnaðurin í yvirbygninginum hjá Post Danmark er góður. Hýrurin og hýran eru góð í offisersmessuni! Nú er tað síðsta, sum fræ感ttist frá leiðsluni í Post Danmark, at teir ætla at taka fólk frá gamla Eystur-Týskalandi og Eystur-Evropa til Danmarkar at ganga við posti. Annars frættist í DR-tíðindunum fyri stuttum, at uml. 20.000 pakkar og brøv vóru stjolin í Post Danmark í fjør. Óstabilitetur ber nógv keðilig hjáárin við sær!

**Sama í Íslandi**
Í Íslandi er (ó)skilið verri um nakað. Vit vóru 4 føroyingar í 2005, sum vitjaðu eitt posthús í Reykjavík. Har høvdu 18 sagt upp innanfyri eitt ár. Ein stórur prosentpartur av starvsfólkunum vóru póllendingar og serbar/kroatar. Eingin íslendingur støðist, og tað av góðum grundum. Byrjanarlønin er neyðars 11.000 danskar krónir um mánaðin! Í Svøríki er trivnaðurin ikki nógv frægari enn í Danmark. Kenni eina 58 ára gamla konu í Eskilstuna, sum hevur 700 húski á rutini, og eina løn uppá 18.000 svenskar krónir um mánaðin. Brennandi spurningurin er so, um hetta eisini verður gongdin aðrastaðni??

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.